# JT electric hevur selt 500 aliljós í Chili

**Mikudagin var móttøka á Kambsdali, har felagið vísti fram nýggja bygningin, har meginparturin av virkseminum nú fer fram**

FISH FAIR
*Vilmund Jacobsen*

**Sosialurin í Saltangará:** El-fyritøkan, JT electric á Kambsdali, er millum føroysku fyritøkurnar, sum hevur verið við á North Atlantic Fish Fair.

Mikudagin bjóðaði fyritøkan til móttøku á Kambsdali, har felagið hevur reist ein bygning. JT electric syrgdi fyri ókeypis bussferð av Fish Fair norður á Kambsdal, og fleiri nýttu høvi at síggja snotuligu hølini.

## Serliga ljósini

Sosialurin vitjaði á básinum hjá JT electric mikudagin, har vit hittu stjóran í felagnum, Per Christensen.

Per greiddi okkum frá søgu felagsins, sum hevur fleiri ár á baki, men hesum skulu vit ikki gera burtur úr á hesum sinni.

JT electric eigur tvey dóttirfeløg, Tummas Thomsen í Klaksvík og JP electric ltd. í Chili, har dentur hevur verið lagdur á ljós til alivinnuna.

Á Kambsdali arbeiða 25 fólk, í Klaksvík 8-10, og í Chili eru tvey fólk knýtt at fyritøkuni.

Per sigur, at tað, sum fyritøkan serliga hevur lagt dent á, eru kendu og vælumtóktu ljósini til alivinnuna, sum hava til endamáls at seinka kynsbúningini, soleiðis at alifiskurin etur meira og veksur skjótari.

- Henda skipan er við tíðini útbygd til eisini at fevna um kamera, har fylgjast kann við fiskinum í kørunum ella ringunum og blunkljósi omaná skipanini, so aliringarnir eisini kunnu síggjast í myrkri.

Per sigur, at tað serliga eru aliljósini, sum sett verða niður í ringarnar, ið JT electric eru kendir fyri. Felagið byrjaði at framleiða hesi ljós fyri umleið 10 árum síðan, og síðan eru tey betraði so hvørt, sum árini eru gingin.

- Vit hava havt ein hampiliga stóran útflutning av hesum ljósum, serliga til Chili, sum alir nógvan fisk. Tann eina bíleggingin til Chili var uppá 200 ljós, men samlaða talið, sum farið er hagar, er eini 500 ljós. Vit hava eisini selt hesi ljós til onnur lond.

Stjórin sigur, at JT electric kann útvega smoltstøðum og alistøðum lidnar fóðurskipanir og aðrar skipanir til alivinnuna, tí felagið hevur stóran førleika og drúgvar royndir. Haraftrat kemur, at JT electric hevur neyvt samstarv við útlendsk feløg.




*Hetta er ljósskipanin, sum JT electric hevur lagt stóran dent á í sínum virksemi. Kamera, har tú kanst fylgja fiskinum og blunkljós omaná, fylgja eisini skipanini, um tað er ynskiligt*
*Mynd: Vilmund Jacobsen*

## Fleiri bein

Per sigur, at upprunaliga var JT electric eitt vanligt el-instalatørvirki, sum tók sær av vanligum el-arbeiði, og tað er felagið eisini í dag. Sama er í Klaksvík.

- Men til tess at hava fleiri bein at standa á, byrjaðu vit at framleiða ljós til alivinnuna, og tá ið hol varð sett á her, avgjørdu vit eisini at royna aðrar loysnir til alivinnuna.

Hann vísir á, at nú ein ávís kreppa er í alivinnuni, hevur JT electric enn einaferð lagt seg eftir at skapa sær nýggjar møguleikar.

- Tí eru vit eisini farnir at selja el-talvur, bæði stórar og smáar, eins og vit hava el-motorar í nógvum støddum, sigur Per Christensen.

JT electric samstarvar eitt nú við danska felagið, El steel og Geveke teknik í Danmark og Vaki i Íslandi.




*Hetta er nýggi bygningurin hjá JT electric á Kambsdali. Mikudagin hevði felagið móttøku, har ókeypis bussur koyrdi av Fish Fair stevnuni og inn á Kambsdal.*

# Býráðsformenn vitja básin hjá Sosialinum

FISH FAIR
*Vilmund Jacobsen*

Fólk hava verið prátingarsom og áhugaði í tí arbeiði, vit gera, og onkur hevur undrast yvir, at til ber at sita á sjálvari stevnuni og fáa alt uppá pláss til røttu tíðina, bæði tekst og myndir

Sosialurin í Saltangará: Nógv fólk hevur vitjað á básinum hjá Sosialinum á Fish Fair stevnuni. Fólk hava havt stóran áhuga í tí, vit gera, og tað hevur kanska virkað hugtakandi fyri fleiri, at vit hava sitið á stevnuni og skrivað um tað, sum her fer fram.

Mikudagin stukku nakrir býráðsformenn framvið, og vit hildu, at teir áttu at sleppa inni í "hitan" hjá Sosialinum.

Teir høvdu einki ímóti at sleppa uppá eina mynd við Sosialinum í bakgrundini – og tað høvdu vit heldur ikki...

Á básinum hjá Sosialinum hava vit eftir førimuni roynt at kunnað um virksemið hjá blaðnum, og fólk hava eisini havt møguleika at fara út á internetið á tveimum teldum, sum hava verið tøkar til endamálið.

So skjótt, Sosialurin er komin út, hevur verið boðað frá, at blaðið fæst ókeypis básinum.

Fólk hava verið prátingarsom, og onkur hevur undrað seg yvir, at til ber at sita á sjálvari stevnuni og fáa alt uppá pláss til røttu tíðina, bæði tekst og myndir.




*Her vitja býráðsformenn saman við øðrum á básinum hjá Sosialinum.*
*Mynd: Vilmund Jacobsen*



# Ungir mans kollvelta fiskivinnuna




*Thomas Hansen og Páll Fagraberg frammanfyri maskinuna, sum teir hava ment í samstarvi við fyritøkuna FJM.*
*Mynd: Eyðun Klakstein*

**Fyri fyrstu ferð er ein maskina gjørd, sum kann skilja ímillum fiskasløgini. Tveir ungir mans hava staðið fyri arbeiðnum at gera heilan í maskinuni**

TØKNI
*Eyðun Klakstein*

Hon kann snakka.

Tað var tann stóra søgan um nýggju skiljimaskinuna, sum FJM og Marine Tech í felag hava gjørt.

Men í grundini er tað einki.

Tað er lætt at fáa eina maskinu at tosa.

Tað er nógv verri at fáa hana at skilja ímillum fiskasløg.

Tað hava fleiri arbeitt við í nógv ár, uttan at tað hevur eydnast.

Ikki fyrr enn nú.

Tveir ungir mans hava seinastu tríggjar mánaðirnar arbeitt við eini tøkni, sum fær eina maskinu at skilja ímillum fiskasløgini.

Á Fish Fair-stevnuni í Runavík verður hendan maskinan sýnd fram, og áhugin fyri henni er sera stórur – bæði ímillum føroyingar og útlendingar.

## Í ørviti av áhuga

Høgni Fagraberg, sum tekur seinasta partin av lesnaðinum í verkfrøði, og Thomas Hansen, sum er datamatikari, hava úr at gera, nú fólk í hópatali vilja hava teir greiða frá, hvussu nýggja skiljimaskin virkar.

– Í gjár var eg í ørviti, sum eg skuldi greiða øllum frá maskinuni, sigur Thomas Hansen.

Teir báðir ungu menninir funnu í fjør saman og hava nú felagið Marine Tech, sum hevur gjørt ymiskar skipanir til fiskivinnuna. Til dømis hava teir loyst onkra uppgáva á Høvdavirkinum í Leirvík.

Men nú eru øll á gosi um nýggju tøknina hjá teimum.

– Í grundini var tað rættiliga tilvildarligt, at vit komu í samband við FJM. Men hetta ljóðaði sum ein spennandi uppgáva, og vit tóku av, sigur Páll Fagraberg, sum leitaði sær heim úr Danmark fyri fara undir nýggju uppgávuna. Síðani hevur hann valla havt tíð til nakað annað enn arbeiðið við maskinuni, sum teir hava givið navnið IQ3550.

## Maskina er sum eitt barn

Tað nýggja við maskinuni hjá FJM og Marine Tech er, at hon kann skilja ímillum fiskasløgini. Hetta kunnu skiljimaskinur, sum verða brúktar í dag, ikki gera, og tí er talan um eina lítla kollvelting.

– Maskinan er sum eitt lítið barn. Hon skal lærast upp. Í fyrstuni kennir hon einki fiskaslag, men tess meira fiskur verður koyrdur ígjøgnum hana, betri verður hon til at skilja ímillum sløgini, greiðir Thomas Hansen frá.

Tí er nógv arbeiðið við fyrstu maskinuni fyri at fáa hana at kenna sløgini, men tá ið tað arbeiðið er gjørt, kann tað flytast í allar aðrar maskinur, sum verða gjørdar.

– Vit høvdu 400 fiskar ígjøgnum í gjár, og hon gjørdi átta mistøk, so hon hevur lært nógv seinastu tíðina. Hetta er ein demoútgáva av maskinuni. Tað er framvegis nógv arbeiðið eftir at gera, men tað skulu vit í holt við aftaná hesa stevnuna.

## Stórir møguleikar

Hjá fyritøkuni FJM síggja teir stórar møguleikar í maskinuni, tá ið hon einaferð verður klár at selja.

– Áhugin fyri maskinuni hevur verið sera stórur, men enn kunnu vit ikki fara at selja hana. Næstu tíðina skulu vit brúka til at menna maskinuna og gera hana betri, sigur Frithleif Olsen, stjóri á FJM.

Eingin torir at siga nakað um, nær lidna maskinan verður veruleiki.

Teir hava nógvar royndir í at samantvinna mekanisku førleikarnar hjá fyritøkuni við nýggjastu tøknina. Í dag kann so at siga eingin maskina gerast, uttan at onkur stýriskipan ella skráseting skal forritast til maskinuna.

– Í fyrstuni var ætlanin at gera eina maskinu, sum kundi skilja ímillum litir, men tað endaði við, at vit fóru undir hesa maskinuna, sigur Frithleif Olsen.

## Nógv eftir enn

Páll Fagraberg og Thomas Hansen fóru í holt við maskinuna fyri trimum mánaðum síðani, og tí eru teir komnir sera langt upp á stutta tíð, tí onnur hava arbeitt nógv longri við hesum hugskoti uttan at koma nakran serligan veg.

– Tað hevur verið strævið, men eisini sera læruríkt og mennandi fyri okkum, sigur Thomas Hansen.

Barnið hjá teimum hevur nógv eftir at læra, men teir ætla at halda fram við uppalingini maskinuna komandi tíðina.

– Eg gleði meg til maskinan verður vaksin og flytir heimanífrá, sigur Páll Fagraberg.

## Hetta skapar nýggjar møguleikar

**Stjórin á Fiskamarknaði Føroya heldur, at nýggja skiljimaskina kann effektivisera fiskivinnuna heilt nógv**

FISKIVINNA
*Eyðun Klakstein*

John Nielsen, stjóri á Fiskamarknaði Føroya, er ein av teimum, sum við hevur sýnt áhuga fyri nýggju skiljimaskinuni hjá FJM og Marine Tech.

– Hatta er ein sera spennandi ætlan, og verður hon veruleiki, so kann hon skapa nógvar nýggjar møguleikar fyri vinnuna, og hon kann effektivisera framleiðsluna nógv, sigur John Nielsen.

### Kunnu spara nógv fólk

Fiskamarknaður Føroya hevur gjørt stóra íløgu í eina góða skiljiskipan fyri at rationalisera virksemið, men um nýggja tøknin verður ment til eina lidna maskinu, so skapar hon nýggjar møguleikar.

– Vit kundu hugsað okkum eina automatiserað ílegging av fiskinum, men tað krevur, at vit hava eina maskinu, sum kann skilja ímillum fiskasløgini. Tað verður kanska veruleiki nú, og tí skapar tað møguleikar at menna eina automatiska íleggingarskipan, sigur John Nielsen.

Hetta kann effektivisera framleiðsluna munandi, tí helvtin av fólkinum hjá Fiskamarknaði Føroya eru íleggjarar.

– Hendan tøknin kann eisini brúkast til nógv annað, um hon fæst at rigga, og tí vóni eg, at tað fer at ganga væl við menningini av henni framyvir, sigur John Nielsen.